# Váðafúsi

Brøðurnir Heini og Per Zachariassen eru báðir nýskapandi íbirtarir. Teir eru ikki bangnir fyri at vága alt, og higartil eru teir slopnir væl frá tí. Dirvið til at taka kjansir hava teir fingið í einum tryggum umhvørvi heima, siga teir millum annað í samrøðu við Sosialin í dag.




SAMRØÐA
*Marjun Dalsgaard*
*Mynd: Ólavur Hansen*

Per er tann smædni, Heini tann útvendi. Per fær ilt í búkin, um hann skal tosa framman fyri eini fjøld, Heina tosar og skemtar alla tíðina. Per vil hava frið við jøvnum millumbilum og fær flest hugskot, tá hann situr einsamallur, Heini er glaður fyri at búgva í Kastrup, tí so er tað ikki so langt til nærmasta flogfar. Vit mugu út! Sigur hann. Per hatar tað siðabundna, meðan Heini livur meira "safe".

Brøðurnir Per og Heini Zachariassen eru samdir um alt - eisini, at teir eru mótsetningar - men líkjast eittsindur kortini.

## Per

Nógvir føroyingar hugsa um Guðruna Sólju, um tú sigur "Stjerne for en aften", men tað er líka so nærliggjandi, at siga Per Zachariassen, ið er eitt av høvdunum aftanfyri sendingina.

Seinast vit hoyrdu um Per var í mars mánaða, tá hann seldi fyritøkuna Blu, til miðlakonglomeratin, Fremantle Media. Prísurin var so góður, at teir ikki kundu siga nei takk, segði Per við Sosialin í samband við søluna.

Per Zachariassen er 35 ár og er nummar tvey í einum systkinaflokki á fýra. Hann starvaðist sum heilt ungur í Sjónvarpi Føroya og fór so undir framleiðsluútbúgvingina á danska filmskúlanum.

Eftir lokna útbúgving fekk hann starv á Danmarks Radio, og har var hann millum annað við til at gera vælumtóktu ungdómssendingina "Transit". Í nøkur ár var Per freelansari og gjørdi tá sendingar fyri Wegelius/Tv Danmark, har Henrik Hancke Nieslen var stjóri. Í 2001 stovnaði Per fyritøkuna Blu saman við Henrik Hancke Nielsen, og í dag standa teirra nøvn undir fleiri av teimum best umtóktu undirhaldssendingunum, ið verða vístar í danska sjónvarpinum. Summar av teimum eru somuleiðis seldar til sjónvarpsstøðir kring heimin.

Við Blu vunnu Per Zachariassen og Henrik Hancke Nielsen 3. virðislønina tá danska stjórnin lat íbirtingarprísin í 2004.

## Heini

Heini er 32 ár. Hann er nummar trý í systkinaflokkinum. Heini fór fyrst í bankalæru, síðan á handilsskúlan í Marknagili áðrenn leiðin gekk til Keypmannahavnar. Her fór hann undir at lesa til siviløkonom á Lærda Handilsháskúlanum. Meðan Heini var undir lesnaði, gjørdi hann internetloysnir í felagnum Experience saman við Thomas Kristensen, sum hann læs saman við, og seinni stovnaði fyritøkuna Virus112 saman við í 1999. Í dag er Heini ein av stjórunum í BullGuard, ein KT fyritøka, ið kappast við altjóða risar á marknaðinum um at menna software til trygging av teldum til privatar brúkarar. BullGuard, ið varð stovnað í 2002, hevur í dag 40 fólk í arbeiði móti bert fýra fyri einum ári síðani. Orsøkin til, at fyritøkan hevur ment seg nógv seinasta árið, er millum annað, at teir hava valt at flyta størv til Onglands og Rumenia.

Heina hoyrdu vit millum annað, tá hann fyri umleið tveimum mánaðum síðani var í føroysku fjølmiðlunum og tosaði um Føroyar sum eitt meira dynamiskt samfelag - bíligari ferðaseðlar og fleiri veitarar av alnótini vóru nøkur av viðurskiftunum, men sum heild var boðskapurin at Føroyar má út í heimin, og at Føroyar má taka heimin til sín.

Heini er nevndarlimur í íbirtingarfelagnum Set P/F. Grunnurin hevur til endamáls at stuðla íbirtarum fíggjarliga og skjóta tann fyrsta peningin í vinnuligar verkætlanir.

## Tryggan barndóm

Felagsnevnarin fyri brøðurnir Zachariassen er nýhugsan og íverksetan. Men hvat í teirra uppvøkstri hevur gjørt, at teir báðir hava valt lívsstarv merkt av ótryggleika og nýskapan?

Per: Tað er møguliga tí, at vit hava havt ein tryggan barndóm.

Høvdið hjá Heina nikkar upp og niður, meðan Per tosar

- Um tú ikki kennir avleiðingarnar av, at tað gongur illa, ert tú ikki líka bangin fyri at taka kjansir, sum hvis tú hevur havt ein minni tryggan barndóm og hevur upplivað at mangla nakað, heldur Per fram.

Heini heldur somuleiðis, at tað hevur havt eina ávirkan, at pápin er teldufrøðingur og arbeiddi við teldum, tá teldurnar enn vóru nýggjar í okkara hugaheimi.

- Tær stóðu nærmast á keiini enn - vit hava altíð áhugaðir í tí nýggja av tí sama, haldi eg, sigur Heini

Per: Vit hava nokk eisini altíð gjørt okkum ómak fyri at skilja okkum burturúr í systkinaflokkinum. Høvdið hjá Heina fer aftur upp og niður.

- Ja, ja, tað hava vit, ja, sigur hann.

Per: Reint teoretiskt eri eg nokk tann, sum okkara foreldur hava givið minst gætur, tí eg eri nummar tvey av fýra. So eg havi kanska roynt at skilja meg burturúr mongdini, fyri at fólk skuldu fáa eyga á meg. Eg veit ikki, Heini sigur, at hann er eisini...

Heini: Ja, eg eri eisini miðlingur - heilt sikkurt eisini miðlingur. Eg eri nummar trý av fýra.

Per: Men mítt nummar í røðini ger, at eg nokk havi verið meira ósjónligur enn tú, eg var umleið tvey ár tá tú kom - tú var yngst fyrst.

Heini: Ja,ja átta ár - men so havi eg eisini verið miðlingur síðan.

Per: Men altso. Tað varð aldrin gjørdur munur á okkum - altso alt gott um tað

- Ja, alt gott um tað - sig ikki at tað var ringt, so fer mamma bara at gráta, sigur Heini, ið skemtar næstan alla tíðina undir samrøðuni.

Per: Nei, alt gott um tað, men tað hevur kanska gjørt, at vit hava stríðst fyri at vera nakað serligt.

Heini: Ja, ja.

## Mótsetningar

Men hvussu eru miðlingabrøðurnir so?

- Vit eru øgiliga ymiskir. Heini er nokk meira útvendur, hevur fleiri kenningar - kanska eisini størri tørv enn eg á at hava samband við onnur fólk, sigur Per, ið dámar betur at arbeiða einsamallur.

- Eg má hava minst tveir dagar um vikuna fyri meg sjálvan. So livir Heini nokk lívið meira trygt